


# Lærarastarv í Viðareiðis Skúla

**Viðareiðis skúli søkir eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 at byrja 1. august 2007**

Søkt verður eftir einum lærara til fulla tíð

**Tann, ið sett verður skal:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús/fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærara, ið m.a. kann átaka sær at undirvísa í:**
- føroyskum, ítrótti og handaverk og list í 1. flokki
- donskum og enskum í 4. og 5. flokki
- handaligum lærugreinum

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Løn**
Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 10. juli kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Jensebeth Absalonsen, á tlf. 45 11 80 ella 58 80 52.

**Viðareiðis skúli** hevur komandi skúlaár 50 næmingar og 7 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/vid



# Varaleiðari og pedagogur

Dagstovnurin í Løkjatúni søkir eftir varaleiðara at arbeiða 40 tímar um vikuna og einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna. Størvini eru til frítíðarskúlan og barnagarðin.

**Stovnurin**
Dagstovnurin í Løkjatúni er nýggjur stovnur, ið er normeraður til 50 frítíðarskúlabørn frá 1. og 2. flokki úr Argja skúla, 16 barnagarðsbørn og 12 vøggustovubørn.

Dagstovnurin í Løkjatúni kann bjóða eitt spennandi og mennandi umhvørvi. Uttan fyri er Sandá og Sandagerð har børnini ofta fara at fanga kombikk og krabbar. Ítróttarvøllur er eisini í nærumhvørvinum. Innandura hevur Dagstovnurin eitt vælútgjørt verkstað og fjølbroyttar møguleikar at menna kunnleika innan tónleik og teldur.

Málið hjá stovninum er at fáa allan stovnin at koyra sum eina eind, so børnini, innan tryggar karmar og undir eftirliti og vegleiðing av vaksnum, kunnu stimbrast og mennast sálarliga, sosialt, handaliga og rørsluliga.

**Størvini**
Varðaleiðarin skal saman við leiðara mynda allan stovnin bæði innanhýsis og uttanhýsis. Neyðugt er, at varðaleiðarin er 30 tímar 'inni í normering' og byrjar 6. august ella eftir nærri avtalu.

Pedagogurin fer at arbeiða 30 tímar og byrjar 6 august ella eftir nærri avtalu.

**Vit vænta av tykkum at tit kunnu**
- menna tað pedagogiska støði á stovninum
- skapa ein tryggan gerandisdag
- samstarva
- opin fyri broytingum
- positivt lívsýni

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum í Løkjatúni, Løkjatún 5, 160 Argir í hendi í seinasta lagi 20. juli 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Steinbjørn Olsen, tlf. 214227.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

# SKRIVSTOVUNÆMINGUR

Á Fútaskrivstovuni í Tórshavn er eitt lærupláss í skrivstovuyrkinum – almenn fyrisiting – leyst at søkja til setan 1. september 2007.

Umsøkjarar mugu hava staðið fráfaringarroynd fólkaskúlans og FHS-, HH-, Students- ella HF-prógv.

Lærutíðin verður fastløgd alt eftir, hvat prógv næmingurin hevur frammanundan.

Í lærutíðini skal næmingurin til Danmarkar á handilsskúla í 15 vikur tilsamans.

Løn verðu veitt eftir sáttmála millum fíggjarmálaráðið og HK-felagið.

Umsókn, prógv og møgulig viðmæli verða at senda Landfútanum, Smyrilsvegur 20, postboks 3018, 110 Tórshavn í seinasta lagi 23. juli 2007.

**FØROYA LANDFÚTI**
Tórshavn, tann 27. juni 2007

Karen Marie Olesen

# Frá Sandvíkar skúla

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærara skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans.
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim.
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar og at samstarva.
- skal eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Starvið fevnir um uml. 8 avlopstímar.**

**Starvið verður lønt**
í lønarflokkum 18.1 – 27.4 sambart avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2007/08.**

**Førleikar**
Læraraútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving.

Umsókn saman við prógvi, c.v. o.ø. skal vera Sandvíkar skúla í hendi í seinasta lagi 12. juli 2007 kl. 16.00.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar til starvið, kunnu ringja til einalæraran Nitu Næs á tlf. 375917 ella 217917.

**Send umsóknina til:**
*Nitu Næs*
*850 Hvalba*



# Honda Civic 1.6i VTEC

Ein sera vælhildin svart metallic honda civic 1.6 i VTEC. km 60.600, árg. 20.09.2001 við stjørnu alufelgum, spoylara aftan, fjarðstýrt centrallàs,aircondition, el rútar, radio v.cd. v.m. bilurin er eyka tectylviðgjørdur

**eftir kl 18 tlf 315860 / 210600**

Sosialurin